LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 16. januar 2025
J.Nr.: LUM-16- 24/10194 og 24/10195
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit
um málsviðgerðina hjá Búnaðarstovuni og Vinnumálaráðnum av eini kæru um sølu av innangarðsjørð burturav einum festi

(Vinnumál vóru við málsøkjabýtinum í desember 2022 løgd til landstýrismannin í Uttanríkis- og vinnumálum. Áður vóru vinnumál undir Umhvørvis- og vinnumálaráðnum)

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um málsviðgerðina hjá Búnaðarstovuni og Vinnumálaráðnum av eini kæru um sølu av innangarðsjørð burturav einum festi.* Klagan var um *fyrisitingarlig brot, um samskipaða viðgerð millum Búnaðarstovuna og Vinnumálaráðið av eini kæruavgerð, notatskyldu og journalisering, eins og fyrisitingarlig lýti við eini avgerð hjá Búnaðarstovuni. Samanumtikið gav umboðsmaðurin Búnaðarstovuni eina átalu fyri málsviðgerðina og minti Búnaðarstovuna á týdningin av at notera upplýsingar frá telefonsamrøðum og fundum, sum kunnu hava týdning fyri viðgerðina av einum máli og gjøgnumskygni í málsviðgerðini. Vinnumálaráðið hevði ikki skjalført teldupostarnar frá Búnaðarstovuni við umbøn um vegleiðing, og telefonnotatir vóru ikki skrivað frá samrøðum í hesum sambandi. Hóast talan ikki var um avgerðarmál hjá Vinnumálaráðnum, var talan um fyrispurningar av slíkum týdningi og vavi, sum ikki einans kundu væntast at fáa ávirkan á ítøkiliga kærumálið, men eisini eitt stórt tal av farnum og komandi málum. Umboðsmaðurin helt tí, at Vinnumálaráðið, sambært góðum fyrisitingarsiði, átti at skjalført og gjørt notatir, so málsskjølini kundu geva eina greiða mynd av leiklutinum hjá ráðnum og teimum svarum, ráðið hevði givið. Vantandi skjalføring og notatir avmarkaðu møguleikan hjá umboðsmanninum at fáa yvirlit yvir málið og hevði eisini elvt til iva og ørkymlan hjá klagarunum. Umboðsmaðurin mælti Vinnumálaráðnum til framyvir at skjalfesta samskifti í slíkum málum og heitti á Vinnumálaráðið um at finna ein leist fyri økið sum skjótast, so Búnaðarstovan fekk avgreitt*

*aktuella kærumálið og onnur komandi endurgjaldsmál. Av tí at umboðsmaðurin metti seg hava rakað við lýti í Løgtingslógini um landsjørð og tilhoyrandi kunngerð, boðaði hon eisini Løgtingi og landsstýrismanninum í Vinnumálum frá hesum, sambært § 12, stk. 1 í lóg um Løgtingsins umboðsmann.*

## 2. Klagan

Við telduposti, tann 17. apríl 2024, sendi A vegna festararnar B og D, soljóðandi klagu:

> ”Viðfest sendi eg eina kæru um málsviðgerðina á Búnaðarstovuni og í Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, av einum ítøkiligum máli um sølu av innangarðsjørð burturav tveimum festum. Kæran varð fyrst send til Løgmálaráðið, eftir at Løgmansskrivstovan hevði avgjørt, at UVMR var ógegnugt at viðgera málið. Løgmálaráðið kom til ta niðurstøðu, at ráðið ikki hevði málsræði til at viðgera kæruna, sum síðan bleiv send løgmansskrivstovuni.
> Í viðfestu avgerð frá løgmansskrivstovuni sæst tó, at einans spurningurin um, hvørt landsstýrismaðurin hevur framt nøkur eyðsýnd lógarbrot. Sostatt hevur ongin yvirliggjandi myndugleiki realitetsviðgjørt kæruna, sum einans hevur verið send runt ímillum fleiri fyrisitingarligar myndugleikar. Av hesi orsøk verður kæran send løgtingsins umboðsmanni í eini vón um, at kæran verður tikin í álvara og viðgjørd av einum kompetentum myndugleika.”

Klaguumboðið sendi, tann 18. apríl 2024, ískoyti til klaguna og vísti á, at:

> “Upprunaliga kæran til Løgmálaráðið varð koyrd í tvíningar. Annar parturin bleiv av Løgmálaráðnum víðarisendur til Løgmansskrivstovuna, meðan Løgmálaráðið sjálvt avgreiddi hin partin (sum ikki er sendur til løgtingsins umboðsmann). Henda klagan snýr seg sostatt einans um tann partin av kæruni, sum bleiv send til Løgmansskrivstovuna.”

Høvuðsklagupunktini í umrøddu klaguni til Løgmansskrivstovuna, dagfest 14. januar 2024, vóru hesi:

> “Kæra um fyrisitingarlig brot í sambandi við mál um keyp av festijørð burturav matr.nr. E markatalsbygd.
> ...
> Gjørt verður galdandi (1), at Búnaðarstovan og táverandi Umhvørvis-og vinnumálaráðið á fundinum teirra millum tann 22. november 2022 hava avtalað hvussu málið skuldi avgreiðast, hóast Løgmansskrivstovan áður hevði tikið avgerð um, at UVMR var ógegnigt í málinum (sí skjal 5). Gjørt verður somuleiðis galdandi (2), at Búnaðarstovan hevur brotið fyrisitingarlógina, við ikki at hava skrivað nakra fundarfrágreiðing frá fundinum (sí skjal 9).
> Telduposturin frá Búnaðarstovuni (...) til B, festara, dagfestur 30. november 2022 (sí skjal 2), skal fatast sum ein avgerð í málinum. Gjørt verður galdandi (3), at álvarslig fyrisitingarlig brot eru framd, tí:

Málið er ikki viðgjørt í tráð við heimvísingarskrivið frá Fiskimálaráðnum dagfest 22. juni 2022. Ongin løgfrøðilig grundgeving fyriliggur fyri avgerðini. Ongin tilvísing er til, hvørjari lógargrein avgerðin hevur heimild í. Ongin kæruvegleiðing fyriliggur. Og málið hevur ikki verið til hoyringar hjá festaranum, áðrenn avgerðin bleiv send.
Gjørt verður galdandi (4), at Búnaðarstovan hevur gjørt seg inn á rættartrygdina hjá festarunum, tí avgerðin hevði eitt skap og innihald sum elvdi til, at hvørgin teirra hevði fatað teldupostin frá 30. november 2022 sum eina avgerð í málinum.
Í nýggju avgerðini hjá Búnaðarstovuni, dagfest 31. mai 2023 (sí skjal 3) verða øll tey fyrisitingarligu brotini, sum nevnd eru omanfyri avvíst við eini viðmerking um, at heimvísingarskrivið frá Fiskimálaráðnum tann 22. juni 2022 ikki gevur ábendingar um, at fyrisitingarlógin ikki er hildin. Hetta svarið er ikki sørt margháttligt, tí tey fyrisitingarligu brotini sum eru ávíst, øll eru framd aftaná at Fiskimálaráðið hevði heimvíst málið. Gjørt verður galdandi (5), at Búnaðarstovan hevur verið greið um hetta, men tilvitað ikki hevur tikið støðu til henda partin av kæruni. Somuleiðis verður gjørt galdandi (6), at Búnaðarstovan tilvitað hevur gjørt málið meira fløkt, við systematiskt at hava heft teldupostar við viðfestum skjølum uppí aðrar teldupostar, og á tann hátt gjørt tað sera trupult hjá øðrum at fáa eina fullfíggjaða fatan av málinum.
Meðan Búnaðarstovan viðgjørdi nýggju kæruna frá 9. mai 2023, var eitt leypandi samskifti millum stovnin og yvirliggjandi fyrisitingarmyndugleikan (Uttanríkis- og vinnumálaráðið) um, hvussu eitt komandi kærumál skuldi avgreiðast (sí skjal 11). Avrátt varð, at:
“Tað einfaldasta fyri Búnaðarstovuna er at taka málið upp til nýggja viðgerð, og so gera somu niðurstøðu enn einaferð, og so kann málið eisini kærast til UVMR, sum nú ikki hevur nakran gegnistrupulleika at viðgerða málið, og hevur tulkingarrættin til Ll um landsjørð, og tískil kann koma til aðra niðurstøðu í málinum í mun til avgerðina hjá FISK, dagf 28. juni 2022.”
Gjørt verður galdandi (7), at omanfyristandandi er beinleiðis “magtfordrejning” har tann undirliggjandi myndugleikin saman við yvirskipaða myndugleikanum, sum eisini er kærumyndugleiki, neyvt samskipa eina fyrisitingarliga avgerð og eina komandi kærumálsviðgerð av sama máli.
Í sínum hoyringssvari til Løgmansskrivstovuna í sambandi við kæruna um ógegni (sí skjal 11) leggur Uttanríkis-og vinnumálaráðið áherslu á, at tað ítøkiliga kærumálið ikki varð viðgjørt á fundinum tann 22. november 2022. Vísandi til at kunningin, sum Búnaðarstovan sendi Runavíkar kommunu tann 29. november 2022 (sí skjal 10), prógvar tað øvugta, verður gjørt galdandi (8), at táverandi Umhvørvis-og vinnumálaráðið ítøkiliga hevur viðgjørt eitt kærumál saman við Búnaðarstovuni, hóast Løgmansskrivstovan frammanundan hevði tikið avgerð um, at ráðið var ógegnigt í málinum. Somuleiðis verður gjørt galdandi (9), at Uttanríkis-og vinnumálaráðið tilvitað hevur latið vera við at kunna Løgmansskrivstovuna um tað neyvu samskipanina av kærumálsviðgerðini, sum víst er á omanfyri...”

## 3. Málsgongd undan kæruni

Málið snúði seg upprunaliga um kæru av loyvi til Runavíkar kommunu at fremja graviroyndir á lendi, sum klagararnir festa. Eftir at málið, vegna ógegni, varð flutt til Fiskimálaráðið, tók

Fiskimálaráðið, tann 26. juni 2022, avgerð um at heimvísa málið til nýggja viðgerð á Búnaðarstovuni. Málið var tó nú broytt, av tí at kommunan hevði slept ætlanini um at grava og í staðin søkt Búnaðarstovuna um at keypa lendi. Fiskimálaráðið hevði mett málið um sølu at vera part av kærumálinum og viðgjørdi tí heimildina hjá Búnaðarstovuni at avhenda landsjørð í sambandi við kæruna. Fiskimálaráðið setti spurnartekin við, hvørt talan var um ognartøku, sambært grundlógini, og sendi Búnaðarstovuni málið aftur til nýggja viðgerð.

Búnaðarstovan tók, tann 31. mai 2023, nýggja avgerð við kæruvegleiðing til Uttanríkis- og vinnumálaráðið. Í avgerðini vísti Búnaðarstovan á, at Búnaðarstovan hevði ta greiðu fatan, at kæruavgerðin ikki setti spurning við heimildina hjá Búnaðarstovuni at selja landsjørð til Runavíkar kommunu. Heimvísingin fevndi um, at Búnaðarstovan ikki hevði tikið støðu til spurningin um ognartøku í mun til § 73 í grundlógini. Búnaðarstovan viðmerkti, at Búnaðarstovan var fyrisitingarmyndugleiki, ið hevði fingið greiða delegatión frá aðalráðnum at umsita m.a. løgtingslóg um landsjørð, og at Búnaðarstovan hevði bert heimild av avgreiða sølu av landsjørð, sambært ávíst ásettum treytum í lógini og tilhoyrandi kunngerð. Búnaðarstovan tók tí ikki støðu til, hvørt løgtingslógin um landsjørð var í stríð við grundlógina § 73, men vísti til, at hesir spurningar kundu leggjast fyri aðalráðið ella dómsvaldið til støðutakan.

Klagararnir valdu at kæra avgerðina hjá Búnaðarstovuni, og eftir lokna viðgerð hjá lutvíst Løgmálaráðnum og lutvíst Løgmansskrivstovuni varð klaga send umboðsmanninum um fyrisitingarligu viðgerðina av kærum teirra, sum klagararnir mettu ikki vóru viðgjørdir.

## 4. Viðmerkingar frá myndugleika og klaguumboði

Av tí at klagan snúði seg um Vinnumálaráðið og Búnaðarstovuna, verða viðmerkingarnar frá myndugleikunum endurgivnar í hvør sínum broti niðanfyri saman við viðmerkingum frá klaguumboðnum.

## 4A. Viðmerkingar frá Búnaðarstovuni og klaguumboði

Tann 1. mai 2024 varð klagan send Búnaðarstovuni til ummælis, eins og Búnaðarstovan varð biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum.

Tann 30. mai 2024 sendi Búnaðarstovan umboðsmanninum skjølini í málinum og soljóðandi viðmerkingar:

> "Búnaðarstovan vil svara fylgjandi til tey 9 klagupunktini, ið kærarin ger galdandi:
>
> Ad. 1-2.: At Búnaðarstovan á fundi hin 22. nov. 2022 hava avtalað við Umhvørvis- og Vinnumálaráði, hvussu málið skuldi avgreiðast. At Búnaðarstovan hevur brotið fyrisitingarlógina, við ikki at hava skrivað nakra fundarfrágreiðing.

Búnaðarstovan vil burturvísa pástandin hjá klagaranum. Búnaðarstovan hevði biðið um fundin við aðalráðið, í eini roynd at søkja sær vegleiðing um, hvussu Búnaðarstovan framyvir skal málsviðgera sølu av landsjørð, við tað at kæruavgerðin hjá Fiskimálaráðnum, hin 28. juni 2022, leggur upp til eina kollveltandi broyting í umsitingini hjá Búnaðarstovuni, hvussu Búnaðarstovan framyvir skal umsita lóg um landsjørð. (skjal 1. og skjal 2.)

Búnaðarstovan er beinleiðis undir aðalráðnum, og er eisini kærumyndugleiki. Tó metir Búnaðarstovan, at stovnurin kann søkja sær ráð og vegleiðing frá aðalráðnum, um generellar spurningar í sambandi við sølu av landsjørð, við tað at núverandi Uttanríkis- og Vinnumálaráðið hevur endaligu fyrisitingarligu ábyrgdina av, hvussu lóg um landsjørð verður umsitin, og aðalráðið hevur eisini tulkingarrættin. Eingin avtala varð gjørd á fundinum hin 22. nov. 2022 og heldur ikki fekk Búnaðarstovan nakað svar á fundinum. Talan var um ein óformellan fund, har ið avgerðin hjá Fiskimálaráðnum varð umrødd. Búnaðarstovan fekk at vita, at aðalráðið vildi venda aftur til spurningin, hvussu Búnaðarstovan skuldi fyrisita sølumál framyvir. Búnaðarstovan hevur ikki fingið nakað svar, hvørki skrivliga ella munnliga, hóast Búnaðarstovan fleiri ferðir hevur rykt eftir svari frá aðalráðnum. Búnaðarstovan metti ikki, at neyðugt var at skriva nakra fundarfrágreiðing í hesum føri.

Ad. 3.: Pástandir frá klagaranum, at Búnaðarstovan hevur framt álvarslig fyrisitingarlig brot:

3.1. Málið er ikki viðgjørt í tráð við heimvísingarskrivið frá Fiskimálaráðnum, hin 28. juni 2022:

Búnaðarstovan vil burturvísa hesum pástandi. Tað er júst í avgerðini hjá Fiskimálaráðnum, har ráðið fer inn í eina viðgerð og ger eina meting um, at sølan av landsjørð er partur av málinum, hóast festararnir einans kæra um sjálvt graviloyvið. Avgerðin hjá Fiskimálaráðnum setir ikki spurnartekin við heimildina hjá Búnaðarstovuni at selja landsjørð í hesum ítøkiliga málið. Tó velur Fiskimálaráðið sjálvt at viðgera og tulka lóg um landsjørð soleiðis, at málið verður einans heimvíst grundað á endurgjaldsspurningin um rakstrarmiss, og hvørt talan er eitt inntriv, sum er fevnt av gl. § 73. Fiskimálaráðið hevur sent teldupost til ... *(kærara, mín viðm.)*, 28. juni 2022, har verður sagt: Búnaðarstovan og Kommunan halda áfram við søluni av lendinum, og hesin parturin er kæruviðgjørdur, sí viðfestu avgerð. (skjal 3.)

Tískil er eingin forðing fyri, at sjálv avhendingin um sølu av landsjørð verður avgreidd, og spurningurin um endurgjald fyri rakstrarmiss ella inntriv grundað á gl. § 73 verður avgreidd efturfylgjandi, vónandi sambært eini vegleiðing frá aðalráðnum, ið hevur tulkingarrættin um umsiting av løgtingslóg um landsjørð. Tískil er telduposturin frá 30. nov. 2022 í fult samsvar við avgerðina hjá Fiskimálaráðnum. Fiskimálaráðið sigur greitt, at Búnaðarstovan sum útgangsstøði kann selja, og tískil er sjálv sølan ein avgreiðsluspurningur hjá Búnaðarstovuni. Búnaðarstovan hevur einki grundarlag at nokta umsóknini frá Runavíkar kommunu at selja landsjørð. (skjal 4. og skjal 5.)

3.2. Ongin løgfrøðilig grundgeving fyriliggur fyri avgerðini.

Búnaðarstovan vil burturvísa hesum pástandi vísandi til pkt. 3.1. Búnaðarstovan ger júst tað rætta sambært góðan fyrisitingarligan sið, nevniliga at taka málið enn einaferð upp grundað á kæru frá festaranum hin 9. juni 2023 viðvíkjandi telduskrivinum hjá Búnaðarstovuni frá 30. nov. 2022. Víst verður til avgerðina hjá Búnaðarstovuni, hin 31. mai 2023, har ið Búnaðarstovan endaliga tekur støðu til rakstrarmiss og møguligt endurgjald, jvb. § 73 í grundlógini eftir fyriliggjandi grundarlagi, tá ið eingin vegleiðing ella svar fyriliggur frá aðalráðnum. (skjal 6.)

3.3. Ongin tilvísing er til, hvørjari lógargrein avgerðin hevur heimild í.

Búnaðarstovan vil burturvísa hesum pástandi, júst tí at eitt aðalráð hevur viðgjørt spurningin um sølu av landsjørð í avgerð síni (sí pkt. 3.1) Fiskimálaráðið hevur heldur ikki givið sølutilgongdini ella avhendingini steðgandi virknað.

3.4. Ongin kæruvegleiðing fyriliggur.

Málið er viðgjørt av Fiskimálaráðnum, sum kærumyndugleiki, og telduskrivið frá 30. nov. 2022 er ikki ein avgerð um endurgjaldsspurningin, men ein beinleiðis avleiðing av, at eingin forðing er fyri, at avgreiða sjálva søluna av landsjørð. Um so var, at telduskrivið frá 30. nov. 2022 var ein avgerð um heimvísingina hjá Fiskimálaráðnum um endurgjald jvb. Gr. § 73, so skuldi Búnaðarstovan sjálvandi givið kæruvegleiðing. (Búnaðarstovan hevði samrøðu við Fiskimálaráðið sama dag, ið kæruavgerðin var send Búnaðarstovuni, har ið Búnaðarstovan fekk greitt at vita, at avgerðin ikki var nøkur forðing fyri, at Búnaaðrstovan avgreiddi sjálva søluna til Runavíkar kommunu) (skjal 7.)

3.5. Og málið hevur ikki verið til hoyringar hjá festaranum, áðrenn avgerðin bleiv send.

Kjarnan í málinum er, at festarar hava einki ímóti, at G verður gjørdur, men teir vilja hava eitt endurgjald fyri inntøkumiss, antin veltan bø ella samsvarandi endurgjald. Tað er eingin grund til at hoyra festararnar um sølumálið, tá ið eitt aðalráð hevur tikið eina kæruavgerð, har ið niðurstøðan er greið, at málið verður heimvíst við álegging um, at Búnaðarstovan skal taka støðu til, hvørt talan er um eitt mál, ið er fevnt av gr. § 73, sum kann elva til endurgjald. (skjal 8.)

Ad. 4. At Búnaðarstovan hevur gjørt seg inn á rættartrygdina hjá festaranum, tí avgerðin hevði eitt skap og innihald sum elvdi til, at hvørgin teirra hevði fatað teldupostin frá 30 nov. 2022, sum eina avgerð í málinum.

Telduposturin frá 30. nov. 2022 er ein fráboðan um, at avgerðin hjá Fiskimálaráðnum fær ta avleiðing, at Búnaðarstovan kann avgreiða sølumálið, meðan endurgjaldsspurningurin verður avgreiddur seinni.

Í kæruavgerðini hjá Fiskimálaráðnum verður sølumálið viðgjørt, so tað er eingin orsøk til at endurtaka sølumálið, við tað at heimvísingaravgerðin fevnir bert um endurgjaldsspurningin. (Víst verður til pkt. 3 og skjal 3)

Búnaðarstovan vil tískil burturvísa pástandinum um, at Búnaðarstovan hevur gjørt seg inn á rættartrygdina hjá festaranum.

Ad. 5-6. At Búnaðarstovan tilvitað ikki hevur tikið støðu til kæruna frá 9. mai 2023, um álvarslig fyrisitingarlig brot. At Búnaðarstovan tilvitað hevur gjørt málið meira fløkt….

Búnaðarstovan og klagarin hava heilt hvør sína fatan av, hvør løgfrøðiliga fylgjan og avleiðingin verður av kæruavgerðini hjá Fiskimálaráðnum hin 28. juni 2022. Tá ið aðalráðið hevur viðgjørt heimildina hjá Búnaðarstovuni um at selja í hesum ítøkiliga føri, so verður fylgjan, at neyðugt verður ikki at viðgera sølumálið av nýggjum. Avleiðingin er, at Búnaðarstovan kann avgreiða søluna og avhenda økið, við tað at heimvísingin fevnir ikki um sølumálið, men um endurgjaldsspurningin, sum áður víst á undir pkt. 3.1.

Búnaðarstovan metir ikki, at Búnaðarstovan tilvitað hevur gjørt málið meiri fløkt, við at senda teldupostar við tilknýttum skjølum/teldupostum. Um so er at skjølini verða prentað út, so er málið ikki so fløkt, sum klagarin vil gera tað til. Búnaðarstovan vil tí burturvísa henda pástand klagarans.

Ad. 7. Klagarin leggur Búnaðarstovuna undir maktreingjan/magtfordrejning, tí at Búnaðarstovan og UVMR hevur samskipa eina fyrisitingarliga avgerð og eina komandi kærumálsviðgerð av sama máli.

Búnaðarstovan vil burturvísa hesum páhaldum hjá klagara. Talan er um gitingar um konspiratión. Talan er als ikki um maktreingjan, við tað at Búnaðarstovan roynir av øllum alvi at loysa málið til frama fyri festarar og Runavíkar kommunu. Búnaðarstovan streingir á aðalráðið um at fáa eina vegleiðing um, hvussu sølumál skulu avgreiðast framyvir. Búnaðarstovan hevur eina røð av sølumálum frá øðrum kommunum, og tí er umráðandi at fáa eina vegleiðing, so at øll mál framyvir kunnu fáa eins avgreiðslu sambært líkheitsgrundregluna.

Búnaðarstovan vil burturvísa pástandi klagarans um, at BST og UVMR hava samskipa eina fyrisitingarliga avgerð og eina komandi kærumálsviðgerð. Búnaðarstovan hevur ikki fingið eitt einasta svar ella vegleiðing frá UVMR.

Ad. 8-9. At UVMR og BST ítøkiliga hava viðgjørt kærumálið, og at UVMR tilvitað hevur latið vera við, at kunna Løgmansskrivstovuna um tað neyvu samskipanina av kærumálsviðgerðini.

Búnaðarstovan vil burturvísa pástandin hjá klagaranum. Talan er um gitingar frá klagara. Tað er rætt, at Búnaðarstovan mangar ferðir, og á mangan hátt hevur roynt at fingið eina vegleiðing frá aðalráðnum um, hvussu Búnaðarstovan skal umsita sølumál framyvir í mun

til endurgjald eftir avgerðina hjá Fiskimálaráðnum. Búnaðarstovan hevur ongantíð fingið nakað svar frá UVMR um henda spurning.

Búnaðarstovan kann bert staðfesta, at tvey aðalráð hava viðgjørt kærumál frá klagaranum um umsitingina hjá Búnaðarstovuni í hesum máli. Tann fremsta uppgávan hjá einum aðalráði í sambandi við eitt kærumál er at fáa greiðu á, hvørt undirliggjandi stovnur hevur hildið fyrisitingarlógina. Hvørki Fiskimálaráðið ella Løgmálaráðið hava nakra viðmerking til avgreiðsluna ella umsitingina hjá Búnaðarstovuni í mun til brot á fyrisitingarlógina.

Niðurstøðan hjá Búnaðarstovuni er greið, at Búnaðarstovan hevur av øllum alvi roynt at loysa málið við avgerðum frá 30. nov. 2022 og 31. mai 2023. Víst verður eisini til avgerðina hjá Búnaðarstovuni í mun til kæruavgerðina hjá Løgmálaráðnum (skjal 9.). Svar Búnaðarstovunar til Løgmálaráðið (skjal 10.). Kæruavgerðin hjá Løgmálaráðnum (skjal 11.)"

Tann 31. mai 2024 vórðu viðmerkingarnar hjá Búnaðarstovuni sendar klaguumboðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Eftir longda svarfreist sendi klaguumboðið, tann 25. juni 2024, umboðsmanninum viðmerkingar, har tikið varð aftur í somu sjónarmið sum í klaguni. Harumframt varð víst á, at kæran ongantíð hevði snúð seg um sjálva søluna av lendinum. Klagararnir høvdu kært um tað manglandi endurgjaldið fyri mistan bø, har processkravið hjá festarunum var bø fyri bø, svarandi til bonitetin á mista bønum. Klaguumboðið vísti á, at kjarnan í kæruni var, at Búnaðarstovan ikki hevði fylgt kæruúrskurðinum frá yvirliggjandi fyrisitingarmyndugleika viðv. endurgjaldinum fyri mistan bø.

Við skrivi, dagfest 1. juli 2024, vórðu viðmerkingarnar hjá klaguumboðnum sendar Búnaðarstovuni til ummælis, og umboðsmaðurin spurdi í hesum sambandi Búnaðarstovuna soljóðandi spurning:

"Í skjalatilfarinum sæst teldupostur frá Búnaðarstovuni til ... *(kærara, mín viðm.)*, dagfestur 22. november 2022, har millum annað verður sagt:

"...Búnaðarstovan hevði fund við Umhvørvis- og Vinnumálaráðið, og var niðurstøðan greið frá fundinum, at festarin skal hava endurgjald fyri rakstrarmiss, antin til at fáa tilsvarandi bø veltan ella eina endurgjaldsupphædd til fulla og endaliga avgreiðslu.

Umhvørvis- og Vinnumálaráðið kemur at senda Búnaðarstovuni skriv, hvussu mannagongdin verður framyvur ísv. sølu av jørð, og hvussu endurgjøld skulu verða avgreidd... "

Umboðsmaðurin spyr, um hesin fundur við Umhvørvis- og vinnumálaráðið, sum verður umrøddur, er fundurin tann 22. november 2022, sum Búnaðarstovan, sambært

frágreiðingini tann 30. mai 2024, ikki metti neyðugt var at skriva nakra fundarfrágreiðing um?"

Tann 12. august 2024 sendi Búnaðarstovan umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

"Ad. 1-2: Búnaðarstovan vil afturvísa páhald kærarans um at UVMR og BST eru ógegnig at viðgera avgerðina hjá Fiskimálaráðnum. Endamálið við fundinum við UVMR var at fáa greiðu á, hvussu BST skuldi framyvir umsita sølu av landsjørð, við tað at kæruavgerðin hjá Fiskimálaráðnum leggur upp til eina tulking av lóg um landsjørð, sum elvir til eina umsitingarliga kollvelting av sølu av landsjørð.

Við tað at tað er UVMR, ið hevur tulkingarrættin til lóg um landsjørð, so hevur Búnaðarstovan ikki nakran annan at venda sær til uttan UVMR, fyri at fáa eina vegleiðing um, hvørt avgerðin hjá Fiskimálaráðnum elvir til eina aðra umsiting av sølu av landsjørð enn tann venja sum higartil hevur verið galdandi praksis. Búnaðarstovan sóknaðist eftir, at fáa eina vegleiðing, um hvussu sølu á landsjørð skuldi umsitast framyvir á fundi við aðalráðið, hin 22. nov. 2022. Hóast eingin avgerð var tikin á fundinum, so skuldi aðalráðið venda aftur til Búnaðarstovuna. Hóast fleiri áminningar frá Búnaðarstovuni, um at koma við eini vegleiðing um henda spurning, so hevur aðalráðið ikki vent aftur til BST við nakrari vegleiðing, og tískil hevur Búnaðarstovan hildið fram við somu praksis í sambandi við sølu av landsjørð. Viðfest er frágreiðig frá UVMR til LUM um málið, dagf. 15. mai 2024.

Búnaðarstovan vil afturvísa, at Búnaðarstovan tilvitað hevur latið vera við at skriva nakra fundarfrásøgn frá fundinum við aðalráðið, hin 22. nov. 2022. Búnaðarstovan metir ikki at hava brotið fyrisitingarlógina ella § 6 í Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001, við tað at eingin avgerð varð tikin á fundinum, sum elvdi til eina aðra viðgerð av lóg um landsjørð. Tað framgongur greitt frá innkallingini frá Búnaðarstovuni til aðalráðið, hvat Búnaðarstovan vildi hava svar uppá. Búnaðarstovan fekk einki svar frá aðalráðnum, tó vildi ráðið venda aftur til málið. Búnaðarstovan hevur sóknast eftir, at fáa eina vegleiðing frá aðalráðnum, hvørt niðurstøðan hjá Fiskimálaráðnum elvir til aðra umsiting av sølu av landsjørð, men henda vegleiðing er ikki komin enn.

Ad. 3.: Búnaðarstovan hevur bert ta viðmerking, at málið var tikið upp av nýggjum, og tískil metir Búnaðarstovan at hava røkt sínar skyldur í mun til fyrisitingarlógina.

Ad. 4. : Kjarnan í málinum er júst, hvussu skal lóg um landsjørð umsitast sambært § 9 í Ll. um landsjørð. Búnaðarstovan kann ikki avgreiða sølu av landsjørð øðrvísi enn ásett í Ll. um landsjørð og kunngerð tess. Búnaðarstovan kann ikki fylgja úrskurðum frá aðalráðum, sum eru í stríð við Ll. um landsjørð. Búnaðarstovan kann ikki veita endurgjald, sum hvørki matriel- ella fíggjarlig heimild eru fyri.

Ad. 5-9.: Búnaðarstovan vil afturvísa pástandum kærarans, um at Búnaðarstovan hevur fløkt hetta mál. Tað sum er próvfast er, at tvey aðalráð eru komin við niðurstøðum, sum

ikki hava skilt heimildargrundarlagið í Ll. um landsjørð og kunngerðum tess, við tað at tað krevst lógarbroytingar, fyri at veita annað endurgjald enn tað, ið er ásett í Ll. um landsjørð.

Løgtingsins Umboðsmaður hevur við skrivi dagf. 1. juli 2024 sett fram fyrispurning. Búnaðarstovan skal bert vátta, at talan er um fundin 22. nov. 2022."

Tann 28. november 2024 boðaði umboðsmaðurin Búnaðarstovuni frá, at farið var undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

## 4.B Viðmerkingar frá Vinnumálaráðnum og klaguumboði

Tann 1. mai 2024 varð klagan send Vinnumálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð ráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum.

Tann 15. mai 2024 sendi Vinnumálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

"...Um málið
Í sambandi við vegagerð í Runavík søkti Runavíkar kommuna á heysti 2021 Búnaðarstovuna um loyvi at gera graviroyndir á tveimum festum í Runavíkar kommunu (...). Búnaðarstovan játtaði umsóknini tann 17. februar 2022.

Henda avgerð Búnaðarstovunnar varð kærd til Umhvørvis- og vinnumalaráðið 21. februar 2022. Umhvørvis- og vinnumálaráðið heitti 24. februar 2022 á løgmann um at flyta málið til annað stjórnarráð at viðgera, tí landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum - og við tí eisini Umhvørvis- og vinnumálaráðið - var ógegnigur at viðgera málið. Løgmaður flutti síðani málið til Fiskimálaráðið, sum við avgerð 28. juni 2022 vísti málinum aftur til Búnaðarstovuna til nýggja viðgerð.
Í avgerðini frá 28. juni 2022 vísti Fiskimálaráðið á, at kommunan hevði slept ætlanini um at gera graviroyndir, og at kommunan í staðin fór at keypa lendið frá Búnaðarstovuni.
Fiskimálaraðið gjørdi tí ikki meira við spurningin um graviroyndir, tí hetta var ikki aktuelt longur.
Í staðin viðgjørdi Fiskimálaráðið spurningin um, hvørt søla av landsjørð - og við tí inntriv í festirættindini - er at meta sum ognartøka, sum skal viðgerast eftir § 73 í grundlógini. Av tí at Búnaðarstovan ikki hevði viðgjørt spurningin um ognartøku, vísti Fiskimálaráðið málinum aftur til Búnaðarstovuna til nýggja viðgerð við viðmerking um, at Fiskimálaráðið metti, at talan var um ognartøku. Fiskimálaráðið vísti somuleiðis á, at varð endaliga niðurstøðan, at talan var um ognartøku, átti Búnaðarstovan at taka uppaftur og viðgera av nýggjum tey mál, sum vóru avgreidd, men sum ikki vóru avgreidd í samsvari við grundlógina.

Búnaðarstovan reisti henda spurningurin - hvørt søla av landsjørð er at meta sum ognartøka av festirættindum - mótvegis Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, og spurningurin varð umrøddur á fundi 22. november 2022. Eingin niðurstøða varð gjørd.

Búnaðarstovan tók nýggja avgerð í málinum 31. mai 2023. Í avgerðini vísti Búnaðarstovan á, at heimild er ikki at rinda annað gjald enn tað, sum er ásett í kunngerð um umsiting av landsjørð.

Henda avgerðin varð kærd, men kærarin metti Uttanríkis- og vinnumálaráðið at vera ógegnigt at viðgera málið og vildi tí hava annað stjórnarráð at viðgera málið. Løgmaður flutti tískil málið til Løgmálaráðið at avgreiða, sum síðani tók avgerð í málinum 4. januar 2024.
Løgmálaráðið vísti málinum aftur til Búnaðarstovuna til nýggja viðgerð.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur hesar viðmerkingar til málið:
Búnaðarstovan og Umhvørvis- og vinnumálaráðið umrøddu málið á fundi í november 2022. Henda umrøða snúði seg ikki um ta ítøkiligu kæruna, men um hvørt søla av landsjørð yvirskipað er at meta sum ognartøka eftir § 73 í grundlógini, sbr. niðurstøðuna hjá Fiskimálaráðnum frá 28. juni 2022. Í hesum sambandi kann upplýsast, at Búnaðarstovan í miðal avgreiðir omanfyri 100 mál um sølu av landsjørð um árið.

Eingin niðurstøða varð gjørd hesum viðvíkjandi, og eingin fundarfrásøgn varð skrivað.

31. mai 2023 tók Búnaðarstovan nýggja avgerð í málinum, har Runavíkar kommuna fekk loyvi at grava í lendinum. Búnaðarstovan boðaði samstundis kærarunum frá, at avgerðin kundi kærast til Uttanríkis- og vinnumálaráðið, og at spurningurin um ognartøku ikki varð viðgjørdur, tí Búnaðarstovan metti seg hava greiða heimild at selja landsjørð eftir lóg um landsjørð.

Hvørki táverandi Umhvørvis- og vinnumálaráð ella Uttanríkis- og vinnumálaráðið hava viðgjørt sjálvt kærumálið; einans generelli spurningurin um, hvørt søla av landsjørð yvirskipað er at meta sum ognartøka, er viðgjørdur.

Gegnisreglurnar hava sum fremsta mál at tryggja, at almenningurin kann hava álit á, at mál verða viðgjørd objektivt og sakligt, og at avgerðir myndugleikans ikki eru arbitrerar ella litaðar av óviðkomandi og/ella persónligum viðurskiftum og áhugamálum. Við hesum í huga er vanligt at vísa frá sær mál, har sjálvt abstraktur váði kann vera fyri, at óviðkomandi viðurskifti og atlit lita ta endaligu avgerðina.
Í løgfrøðiligum bókmentum, sum viðgera gegni, verður kortini eisini víst á, at tað at ein undirskipaður myndugleiki vendir sær til yvirskipaða myndugleikan við generellum spurningum um heimildargrundarlag, lóggávutulking o.tíl. ikki í sjálvum sær hevur við sær, at yvirskipaði myndugleikin verður ógegnigur at viðgera málið í øðrum instansi. Hetta er tó treytað av, at yvirskipaði myndugleikin ikki gevur undirskipaða myndugleikanum eina nágreiniliga og endaliga fatan av, hvussu ítøkiliga málið skal avgerast, tí í slíkum førum er ivaleyst, at yvirskipaði myndugleikin er ógegnigur at viðgera málið í øðrum instansi.
Í hesum ítøkiliga máli hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið (Umhvørvis- og vinnumálaráðið) ikki viðgjørt tað ítøkiliga kærumálið, men einans generella spurningin um, hvørt søla av landsjørð yvirskipað er at meta sum ognartøka eftir grundlógarinnar § 73.”

Tann 22. mai 2024 vórðu viðmerkingarnar hjá Vinnumálaráðnum sendar klaguumboðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 26. mai 2024 sendi klaguumboðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> “...Málslýsingin hjá UVMR er faktuelt skeiv. Búnaðarstovan tók ikki nýggja avgerð í málinum tann 31. mai 2023. Avgerðin í málinum var harafturímóti tikin í telduposti dagfest 30. november 2022. Men eftir at undirritaði sum kærumboð hevði víst á álvarsligar manglar í avgerðini frá 30. november 2022, tók Búnaðarstovan málið upp til nýggja viðgerð, har nýggja avgerðin bleiv tikin við skrivi dagfest 31. mai 2023.
>
> Tað verður bestrítt, at fundurin tann 22. november ikki snúðið seg um tað ítøkiliga kærumálið. Sum viðfestu skjølini prógva, hevði Búnaðarstovan frammanundan fundinum gjørt eina dagsskrá við 5 punktum, sum øll snúðu seg um tað ítøkiliga kærumálið (Skjal 1). Í einum telduposti til Runavíkar kommunu tann 29. november 2022 (Skjal 2) skrivaði Búnaðarstovan, at málið ítøkiliga málið hevði verið umrøtt á fundinum við táverandi Umhvørvis- og vinnumálaráðið tann 22. november 2022. Og avgerðin í málinum var send festarunum í telduposti tann 30. november 2022 eina viku seinni (Skjal 3).
>
> Sostatt er ongin ivi um, at skjølini í málinum prógva, at fundurin millum UVMR og Búnaðarstovuna tann 22. november 2022 snúðið seg um tað ítøkiliga málið. Hetta fór fram, hóast løgmaður eftir umbøn frá landsstýrismanninum í Umhvørvis- og vinnumálum hevði staðfest, at UVMR var ógegnugt í málinum. Gjørt verður harumframt galdandi, at Búnaðarstovan og UVMR tilvitað lótu verða við at gera nakra frágreiðing frá fundinum.
>
> Meðan Búnaðarstovan viðgjørdi nýggju kæruna frá 9. mai 2023, var eitt leypandi samskifti millum stovnin og Uttanríkis- og vinnumálaráðið (yvirliggjandi fyrisitingarmyndugleikan) um, hvussu eitt komandi kærumal skuldi avgreiðast (sí skjal 4). Avrátt varð, at:
>
>> "Tað einfaldasta fyri Búnaðarstovuna er at taka málið upp til nýggja viðgerð, og so gera somu niðurstøðu enn einaferð, og so kann málið eisini kærast til UVMR, sum nú ikki hevur nakran gegnistrupulleika at viðgerða málið, og hevur tulkingarrættin til Ll um landsjørð, og tískil kann koma til aðra niðurstøðu í málinum í mun til avgerðina hjá FISK, dagf. 28. juni 2022."
>
> Hildið verður fast í, at omanfyristandandi er beinleiðis "magtfordrejning" har tann undirliggjandi myndugleikin (Búnaðarstovan) saman við yvirskipaða myndugleikanum (UVMR), sum eisini er kærumyndugleiki, neyvt samskipa eina fyrisitingarliga avgerð og eina komandi kærumálsviðgerð av sama máli. Hetta er bæði hent í tilgongdini í sambandi við fundin á Búnaðarstovuni tann 22. november 2022 og í tilgongdini í sambandi við kærumálsviðgerðina í mai 2023...”

Við skrivi, dagfest 4. juni 2024, vórðu viðmerkingarnar hjá klaguumboðnum sendar Vinnumálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar. Harumframt setti umboðsmaðurin Vinnumálaráðnum soljóðandi nágreinandi spurning:

"Umboðsmaðurin hevur lisið frágreiðingina frá ráðnum, sum varð borin umboðsmanninum tann 15. mai 2024.

Í frágreiðingini stendur millum annað, at Búnaðarstovan reisti spurningin um søla av landsjørð er at meta sum ognartøka av festirættindum mótvegis Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Spurningurin varð umrøddur á fundi tann 22. november 2022, men eingin niðurstøða varð gjørd og ei heldur varð fundarfrásøgn skrivað.

Í handaða skjalatilfarinum síggjast nakrir teldupostar frá Búnaðarstovuni, sum tykjast vera sendir við kæruni um gegni til Løgmansskrivstovnuna, 23/13764-1 og 24/01447-1. Teldupostarnir innihalda ítøkiligar spurningar til umrøðu á komandi fundi og umbøn um vegleiðing.

Er tað rætt skilt, at hesir teldupostar ikki upprunaliga eru skjalførdir av ráðnum ?

Í senda tilfarinum síggjast ikki svar til hesar teldupostar. Eru svar send ella finnast notatir um hvat svarið var?

Eisini spyr umboðsmaðurin, hví eingin fundarfrásøgn var skrivað frá fundinum tann 22. november 2022."

Tann 14. juni 2024 sendi Vinnumálaráðið umboðsmanninum soljóðandi svar:

"...Eftir at Fiskimálaráðið hevði tikið avgerð í málinum 28. juni 2022, vendi Búnaðarstovan sær til Umhvørvis- og vinnumálaráðið til tess at fáa greiðu á, um søla av landsjørð er at meta sum ognartøka, sum skal viðgerast eftir § 73 í grundlógini.
Hesin spurningur varð umrøddur á fundi 22. november 2022. Í telduposti, sendur ráðnum sama morgun, nevnir Búnaðarstovan ymisk viðurskifti, sum hon kundi hugsa sær at fingið svar upp á. Hesi viðurskifti vóru tó ikki umrødd á fundinum, tí Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevði einki við málið at gera og skuldi ikki taka nakra avgerð í málinum. Sostatt snúði umrøðan á fundinum 22. november 2022 seg einans um, hvørt søla av landsjørð er at meta sum ognartøka eftir grundlógarinnar § 73, sbr. eisini skriv ráðsins til Umboðsmannin, dagfest 15. mai 2024.
Í telduposti til Runavíkar kommunu, dagfestur 29. november 2022, nevnir Búnaðarstovan, at hon er farin í eina tilgongd við Umhvørvis- og vinnumálaráðið um, hvussu endurgjaldskrøv í sambandi við rakstrarmiss skulu avgreiðast í síni heild. Búnaðarstovan nevnir somuleiðis, at fundur hevur verið við ráðið, og at Búnaðarstovan væntar at fáa eina skrivliga vegleiðing um hetta. Slík vegleiðing er ikki latin Búnaðarstovuni, tí spurningurin er ikki endaliga viðgjørdur í ráðnum.

Búnaðarstovan hevur síðani reist spurningin um endurgjald fyri rakstrarmiss og ognartøku nakrar ferðir, men Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur ikki viðgjørt málið meira enn við yvirskipaðari umrøðu og uttan at koma til nakra niðurstøðu. Av somu orsøk er einki mál stovnað, eins og teldupostarnir, sum nevndir verða, hvørki eru skjalførdir ella svaraðir. Annað tilfar, t.d. notat o.tíl., er heldur ikki framleitt í sambandi við spurningin.

Ráðið vísti ta fyrru kæruna frá sær í februar 2022 vegna ógegni landsstýrismansins. Málið varð lagt til Fiskimálaráðið at avgreiða, og Umhvørvis- og vinnumálaráðið gjørdi ikki meira við tað málið; hetta sæst eisini á skjølunum í málinum (22/04377), sum Umboðsmaðurin hevur fingið avrit av.

Um ta seinnu kæruna, sum ráðið vísti frá sær í august 2023, skal viðmerkjast, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið metti seg ikki vera ógegnigt at viðgera ta kæruna, tí nýggjur landsstýrismaður var settur.

Kortini boðaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið Løgmansskrivstovuni frá, at ráðið fór ikki at seta seg ímóti, at kæran varð flutt til annað stjórnarráð at viðgera. Henda støða ráðsins var grundað á, at hóast ráðið ikki var ógegnigt, so kundi borgarin hava ta fatan, at ráðið var ógegnigt at viðgera kæruna. Til tess at tryggja, at ivi ikki kundi sáast um gegnið, varð tí boðað frá, at annað stjórnarráð átti at viðgjørt málið. Málið varð flutt Løgmálaráðnum, sum síðani hevur viðgjørt og avgreitt málið.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur ikki viðgjørt málið og hevur heldur ikki tikið nakra avgerð í málinum, hvørki í fyrra ella seinna umfari, tí málini vórðu flutt ávikavist Fiskimálaráðnum og Løgmálaráðnum."

Tann 28. juni 2024 vórðu viðmerkingarnar hjá Vinnumálaráðnum sendar klaguumboðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Eftir longda svarfreist sendi klaguumboðið, tann 9. september 2024, soljóðandi viðmerkingar:

"...Staðfestast kann, at UVMR ikki framleggur eitt tað einasta skjal, sum kann stuðla ella dokumentera teirra lýsing av málinum, sum gjørd verður í hoyringsskrivinum. Í staðin verða nakrir ódokumenteraðir pástandir brúktir til at gera eina málslýsing, sum eg frammanundan havi dokumenterað er faktuelt skeiv. Víst verður í hesum sambandi til undanfarna hoyringsskriv mítt, dagfest 24. mai 2024, og upprunaligu kæruna.
Um tað veruliga er so, at als ongi skjøl ella teldupostsamskifti eru journaliserað í skjalagoymsluni hjá UVMR verður gjørt galdandi, at ráðið tilvitað hevur latið vera við at journalisera hetta. Í øllum førum er tað fevnt av bæði notat- og dokumentatiónsskyldu, at teir teldupostar sum Búnaðarstovan hevur sent ráðnum um málið (og sum áður eru hjálagdir kæruni) áttu at verið journaliseraðir í UVMR. Hesir teldupostar eru áður sendir Løgtingsins Umboðsmanni sum fylgiskriv til kæruna.
Hildið verður fast í, at øll henda málstilgongdin hevur verið merkt av bæði "maktfordrejning" og álvarsomum fyrisitingarligum brotum. Leggjast skal afturat, at UVMR nú roynir at káva útyvir hesi brot, við fyrst at tilonkisgera alla dokumentatión í málinum, og síðan gera eina málslýsing, sum hvørki kann dokumenterast ella er í tráð við tað áður framlagda tilfarið í málinum.
Vegna festararnar skal leggjast afturat, at verður ein slíkur framferðarháttur frá einum týdningarmiklum parti av miðfyrisitingini góðtikin, so er borgarin de facto rættarleysur í teimum førum, har hann er ósamdur við avgerðum sum ein myndugleiki hevur tikið."

Við skrivi, dagfest 4. oktober 2024, setti umboðsmaðurin Vinnumálaráðnum soljóðandi spurning:

> “
>
> ...
> Soleiðis sum umboðsmaðurin skilir málið, er jørðin tískil avhendað, men spurningurin um endurgjald ikki avgreiddur. Avgreiðsla av sølu av landsjørð framyvir tykist ei heldur avklárað.
>
> Umboðsmaðurin vil í hesum sambandi spyrja Uttanríkis- og vinnumálaráðið, hvør støðan er í hesum máli um endurgjald, og hvussu ráðið fyriheldur seg til niðurstøðuna frá Løgmálaráðnum, sum Búnaðarstovan sigur seg ikki kunna fremja. Harumframt ynskir umboðsmaðurin eina frágreiðing um, hvørt ráðið hevur viðgjørt, hvussu Búnaðarstovan framyvir skal viðgera sølu av landsjørð.”

Tann 25. oktober 2024 minti umboðsmaðurin ráðið á fyrispurningin og bað um svar innan 1 viku.

Tann 28. oktober 2024 sendi ráðið umboðsmanninum soljóðandi svar til fyrispurningin:

> “ ...
> Um avgerðina hjá Løgmálaráðnum
> Løgmálaráðið metir í avgerð síni fra 4. januar 2024, at spurningurin um endurgjald eigur at viðgerast sambært § 37 í hagalógini, sum ásett er í § 10, 4. pkt. í løgtingslóg um landsjørð, um semja ikki fæst millum partarnar um spurningin um endurgjald, og at Búnaðarstovan átti at vegleitt partarnar um hetta, tá semja ikki fekst um endurgjald sambært kunngerð nr. 95 frá 23. oktober 2007 um umsiting av landsjørð.
>
> Um lógargrundarlagið
> ...
>
> Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur hesar viðmerkingar
> § 37 í hagalógini ásetur, hvussu farast skal fram, um ósemja um er um avloysing fyri bit og hvat endurgjaldið skal vera. Munur verður ikki gjørdur á landsjørð og ognarjørð.
> Í viðmerkingunum til § 37 stendur m.a. soleiðis:
> Paragraffen indeholder Bestemmelserne om, paa hvilken Maade det vil være at afgøre, om afløsning kan kræves, og hvad der skal ydes i Erstatning.
> Í lov nr. 174/1937 for Færøerne om Jordbruget Fremme, løgtingslóg nr. 59/1988 um landsjørð og løgtingslóg nr. 20/2004 um landsjørð, sum allar eru settar úr gildi, er á ymsan hátt ásett, at festari hevur rætt til endurgjald, tá ið jørð verður seld ella tikin burtur av einum festi. Víst verður ikki til § 37 í hagalógini, hvørki sum møguligan rætt til endurgjald ella sum mannagongd at brúka í sambandi við ósemjur um endurgjald.
>
> Upprunaliga orðingin í § 10 í løgtingslóg um landsjørð frá 2007 vísir til § 37 í hagalógini, men ásetur samstundis, at landsstýrismaðurin í kunngerð ásetur nærri reglur um endurgjald

fyri mist bit og mista fóðurframleiðslu. Hetta er gjørt við kunngerð nr. 95/2007, sum í §§ 9-10 og í fylgiskjali A ásetur kostnaðin fyri at keypa landsjørð, endurgjaldið fyri mist bit, bæði dyrkað og ódyrkað lendi, og endurgjaldið fyri mista fóðurframleioslu í dyrkaðum lendi.

Ásetingin í § 37 í hagalógini ásetur mannagongdina, um ivi er um, hvørt tann, sum missur lendið, hevur rætt til avloysing fyri mist bit, meðan ásetingin í § 10 í løgtingslóg um landsjørð staðfestir, at festari, sum missir bit, altíð hevur rætt til endurgjald fyri mist bit, eins og ásett verður, hvat endurgjaldið skal vera, sbr. ásetingarnar í kunngerð nr. 95/2007.

Við hesum broytingum verður ásetingin í § 37 í hagalógini óneyðug, tá ið talan er um landsjørð, tí við § 10 í løgtingslóg um landsjørð er rætturin til endurgjald fyri mist bit og endurgjaldið sjálvt staðfest. Tilvísingin til § 37 í hagalógini er tí óneyðug og átti tí ikki at verið sett í § 10 í løgtingslóg um landsjørð. § 37 í hagalógini er kortini enn viðkomandi, tá ið talan er um endurgjald fyri mist bit á ognarjørð.
Leggjast kann afturat, at tað í viðmerkingunum til lógaruppskotið (løgtingsmál nr. 107/2006), saman við álitinum frá Vinnunevndini (1øgtingsmál nr. 050/2003), sæst, at hagalógin einans er áhugaverd í sambandi við ta longu ósemjuna um, hvussu endurgjald fyri mist bit skal gjaldast: Skal endurgjaldið rindast festarunum beinleiðis, eins og ognarum, ella skal endurgjaldið rindast Jarðarráðnum (nú Búnaðargrunninum), sum skal tryggja sær, at ábøtur eru gjørdar á hagan, áðrenn endurgjaldið verður goldið festara.

Tað er harumframt viðkomandi at leggja til merkis, at tó at lógarteksturin vísir til § 37 í hagalógini, so vísa almennu viðmerkingarnar til § 37a í hagalógini, sum júst snýr seg um, hvussu endurgjaldið skal verða goldið ávikavist ognarum og festarum. Serligu viðmerkingarnar til 1ógaruppskotið vísa til § 37, men í hesum konteksti:

Við hesi lógargreinini verður skotið upp, at peningur fyri avloysing fyri vetrarbit verður rindaður festaranum/hagastýrinum beinleiðis, t.e. ikki umvegis Búnaðargrunnin. Hetta krevur samstundis eina broyting/dagføring av § 37 í Hagalógini, har ásetingin um, at peningur fyri avloysing viðvíkjandi vetrarbiti verður goldin umvegis Jarðargrunnin/Búnaðargrunnin.
Broytingin í Hagalógini eigur at verða gjørd við fyrst komandi høvi.

Alt bendir sostatt á, at tilvísingin til § 37 er eitt mistak; endamálið við § 10 í løgtingslóg um landsjørð fáa 2007 var fyrst og fremst at áseta greiðar reglur um, at festari altíð hevði rætt til at fáa endurgjald fyri mist bit og skerda fóðurframleiðslu, tá ið jørð varð seld burturav einum almennum festi, eins og endamálið var at áseta sjálva endurgjaldsupphæddina.
Helst er mistakið komið í sambandi við drúgva kjakið um, hvørt festari skuldi fáa endurgjaldið beinleiðis ella um Búnaðargrunnin.
Leggjast kann afturat, at tað, Uttanríkis- og vinnumálaraðnum kunnugt, ikki hava verið sett spurnartekn við, at mál um endurgjald fyri mist bit og skerda fóðurframleiðslu hava verið avgreidd við teimum upphæddum og eftir teimum mannagongdum, sum eru ásettar í kunngerð nr. 95/2007.

Løgtingslóg nr. 65/2013 um broyting í løgtingslóg um landsjørð

...

Løgtingslóg nr. 66/2014 um broyting í løgtingslóg um landsjørð
...

Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal viðmerkja
Á undanfarnum lógum, galdandi lóg, lógarbroytingunum í 2013 og 2014 og á kontekstinum annars sæst, at ætlanin hevur ikki verið at flyta avgreiðsluna av endurgjaldi fyri mist bit og skerda fóðurframleiðslu í sambandi við sølu av jørð úr hondunum á Búnaðarstovuni og til eina metingarnevnd eftir § 37 í hagalógini, tí við broytingini í § 10 er avgjørt, at festari altíð hevur rætt til endurgjald fyri mist bit, eins og endurgjaldsupphæddin er ásett.

Tilvísingin í § 10 fevnir tí einans um tey føri, tá ið land ella kommuna øðrumegin og festari hinumegin ikki semjast um endurgjaldið fyri annan figgjarligan miss (enn fyri mist bit og skerda fóðurframleiðslu), tá ið nýtslurættur til lendi verður tikin aftur eftir § 7a.
Upprunaliga mistakið er komið við løgtingslóg um landsjørð frá 2007. Tá broytingin við § 7a varð samtykt í 2013 átti § 10 at verið rættað, men - av tí at § 7a ikki beinleiðis vísti til § 37 í hagalógini - hevur eingin givið sær far um hetta. Støðan var tann sama, tá ið § 7a varð broytt í 2014.

Við hesi ógreiðu, men kortini formliga galdandi, lógaráseting er skilligt, at Løgmálaráðið metir, at ósemjan um endurgjaldið eigur at verða viðgjørd eftir § 37 í hagalógini.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið metir hinvegin, at endurgjald fyri mist bit og skerda fóðurframleiðslu skal avgreiðast eftir galdandi ásetingum í § 9, stk. 4, og § 11 í løgtingslóg um landsjørð og §§ 9-10 og fylgiskjali A í kunngerð um umsiting av landsjørð.

Um sølu av landsjørð
Tá málið um sølu av innangarðsjørð á F av fyrstan tíð varð kært, snúði málið seg um eitt graviloyvi, sum Búnaðarstovan hevði givið Runavíkar kommunu. Festararnir kærdu hesa avgerð til Umhvørvis- og vinnumálaráðið, sum vísti málinum frá sær vegna ógegni. Kæran varð tí flutt Fiskimálaráðnum.

Meðan kæran varð viðgjørd, gjørdi Runavíkar kommuna av ístaðin at keypa lendið, og kæran um graviloyvi misti tá sín relevans. Málið átti at verið steðgað her, tí mannagongdin, tá ið Búnaðarstovan selur landsjørð til kommunur, er greið.

Búnaðarstovan hevur sambært § 9 í løgtingslóg um landsjørð heimild at selja landsjørð til ymisk endamál. Í § 9, stk. 1, síðsta pkt., er ásett, at peningurin fyri sølu av landsjørð verður fluttur á festikontu.

Løgtingslóg um Búnaðargrunn ásetur í § 5, at tá føst ogn hjá landinum, sum hoyrir til eitt festi, verður seld, skal ágóðin av søluni flytast Búnaðargrunninum og verða bókað á kontu hja avvarðandi festi. Víðari er ásett í § 10a, at Búnaðargrunnurin kann játta festum stuðul av festikontu til ætlanir, sum hava til endamáls at skapa varandi virðisøking av festinum.

> Henda skipan hevur til endamáls at tryggja, at tað, sum eitt festi missir av sínum rakstrargrundarlagi, tá ið jørð verður seld burturav, verður fingið aftur við stuðli til ætlanir, sum hava til endamáls at skapa varandi virðisøking av festinum. Á henda hátt verður vigað upp ímóti tí rakstrartapi, sum einum festi kann vera fyri, tá ið jørð verður seld burturav.
>
> Uttanríkis- og vinnumálaráðið er farið undir at gera broytingar í løgtingslóg um landsjørð, og í hesum sambandi verða reglurnar um sølu av landsjørð eisini viðgjørdar og mettar. Lógaruppskotið verður væntandi lagt fram í hesi tingsetuni.”

## 5. Samskiftið millum Búnaðarstovuna og Vinnumálaráðið

Í sambandi við málið bað umboðsmaðurin Búnaðarstovuna og Vinnumálaráðið um at senda sær skjølini í málinum og skjalayvirlit.

Skjølini, sum umboðsmaðurin fekk frá Vinnumálaráðnum vóru frá fýra málum. Talan var um mál í sambandi við kærumálini, sum vórðu flutt til Fiskimálaráðið og Løgmálaráðið, eins og kærumál til Løgmansskrivstovuna um málsviðgerðina hjá Vinnumálaráðnum.

Vinnumálaráðið hevur greitt umboðsmanninum frá, at einki mál varð stovnað, eins og teldupostarnir, sum nevndir verða niðanfyri, ikki vórðu skjalførdir ella svaraðir. Annað tilfar, t.d. notat o.tíl., varð heldur ikki framleitt í hesum sambandi. Hetta komst av, at ráðið ikki hevði viðgjørt málið og ikki hevði tikið nakra avgerð í málinum.

Onkrir av teldupostunum sóust tó í málunum hjá Vinnumálaráðnum av tí, at klaguumboðið hevði sent tað við síni kæru.

Skjølini, sum umboðsmaðurin fekk frá Búnaðarstovuni vóru frá fimm málum, umframt at Búnaðarstovan eftir seinni umbøn sendi skjølini úr einum innlitsmáli, har klaguumboðið hevði biðið Búnaðarstovuna um partsinnlit og innlit í alt samskiftið, sum Búnaðarstovan hevði haft við Uttanríkis – og vinnumálaráðið frá mai 2023 til apríl 2024.

Niðanfyri verður endurgivið úr skjølunum hjá Búnaðarstovuni fyri at lýsa samskifti.

**Mál 22/05225 hjá Búnaðarstovuni - Fiskimálaráðið. Kæra frá D um avgerð hjá Búnaðarstovuni um graviloyvi til Runavíkar kommunu í matr.nr. E, F bygd ísv. Graviroyndir við G.**

Skjal: Teldupostur til Vinnumálaráðið tann 30. juni 2022 við umbøn um ráðføring
*Tann 30. juni 2022, sendi Búnaðarstovan Vinnumálaráðnum teldupost, har víst varð á, at Búnaðarstovan ikki var samd við niðurstøðuni hjá Fiskimálaráðnum, og at avgerðin var í stríð við ta venju, sum Búnaðarstovan hevði havt. At enda skrivaði ráðgevin í Búnaðarstovuni, at hóast málið var flutt til Fiskimálaráðið vegna ógegni, so fór ráðgevin at loyva sær at ráðføra*

*seg við Vinnumálaráðið, um tað sum bert var um løgfrøði. Ráðgevin fór at ringja til Vinnumálaráðið sama dag.*

*Ikki sæst nakað svar til henda teldupost í skjølunum hjá Búnaðarstovuni.*

Skjal: Innanhýsis teldupostur í Búnaðarstovuni, 30. juni 2022, um telefonsamrøðu við Vinnumálaráðið
*Av innanhýsis telduposti hjá Búnaðarstovuni, tann 30. juni 2022, sæst, at ráðgevin hevði tosað við ráðgeva í Vinnumálaráðnum, sum var samdur við Búnaðarstovuna um avgerðina frá Fiskimálaráðnum, og at viðkomandi vildi hava Búnaðarstovuna at steðga við at taka málið uppaftur til eftir summarferiuna. Hetta hevði ráðgevin í Vinnumálaráðnum avtalað við leiðsluna í ráðnum. Eftir summarsteðgin fór Búnaðarstovan at ráðføra seg við ráðið um, hvussu málið skuldi takast uppaftur.*

*Ikki sæst notat frá hesi samrøðu í skjølunum hjá Búnaðarstovuni.*

Skjal: Teldupostur frá Búnaðarstovuni til Vinnumálaráðið, tann 15. februar 2023, við spurningum um endurgjald
*Tann 15. februar 2023 sendi Búnaðarstovan Vinnumálaráðnum teldupost við spurningum til ráðið. Víst varð til avgerðina frá Fiskimálaráðnum, sum elvdi til, hvørt Búnaðarstovan skuldi taka málið upp til nýggja viðgerð í sambandi við rakstrartap hjá festara. Búnaðarstovan setti hesar ítøkiligu spurningar um málið:*

- Við tað at talan er um tulking av Ll. um landsjørð, verður avleiðingin at málið verður flutt yvir aftur frá FISK til UVMR?
- Hvussu skal Búnaðarstovan á nøktandi hátt umsita § 9 um sølu av landsjørð, tá ið talan kann verða um endurgjald fyri rakstrartap til festara. Serliga um talan er um veltan bø?
- Skal ein metingarnevnd setast, har ið fólk frá báðum pørtum gera eina felagsmeting/sýn. t.d. umboð frá kommunu og BST/festara.
- Ella skal BST gera eina fakliga uppgerð av tí rakstrartapi, ið festarin hevur verið fyri.

*Búnaðarstovan kunnaði í teldupostinum Vinnumálaráðið um, at festararnir vóru byrjaðir at rykkja eftir svari, og tískil skuldi Búnaðarstovan onkursvegna avgreiða málið. Vinnumálaráðið varð biðið um at lata Búnaðarstovuna frætta, hvussu Búnaðarstovan á bestan hátt kundi avgreiða mál av slíkum slag framyvir.*

*Ikki sæst nakað svar til henda teldupost í skjølunum hjá Búnaðarstovuni ella notat frá samrøðu í hesum sambandi.*

**Mál 22/02932 hjá Búnaðarstovuni – Runavíkar kommuna. Keyp av lendi til G av matr. nr. E, F bygd**

Skjal: Teldupostur til Vinnumálaráðið við umbøn um fund, tann 22. november 2022:

*Tann 22. november 2022, kl. 09.39 sendi Búnaðarstovan Vinnumálaráðnum teldupost við umbøn um fund, har ynski var at fáa greiði á hesum fimm evnum:*

1. Kæruavgerðin sigur beinleiðis, at talan er um ognartøku, samb. § 73, og at Búnaðarstovan skal taka støðu til hesa ognartøku... sí blaðs. 3-4 í avgerðini.
2. Búnaðarstovan skilir ikki avgerðina soleiðis, at Búnaðarstovan ikki kann fremja søluna, uttan so at endurgjaldsspurningurin er avgreiddur.
3. Runavíkar kommuna er farin at grava vegin samb. KvF, uttan at skeyti er skrivað, og endaliga avgreitt frá Umhvørvisstovuni um sundurbýtið.
4. Festarin hevur í morgun umrøtt spurningin, hvørt hann skal seta fútaforboð fyri hesum arbeiði. Búnaðarstovan hevur sagt, at Búnaðastovan skal kanna spurningin og venda aftur.
5. Hvussu skal Búnaðarstovan sakliga avgreiða kæruavgerðina um ognartøku, har ið sagt verður at øll slík mál skulu viðgerast av nýggjum, ið ikki eru avgreidd í tráð við grundlógina.

*Búnaðarstovan endaði teldupostin við, at hetta vóru nakrir av spurningunum til fundin.*
*Avrit av teldupostinum við umbøn um fund var sama dag send klagaranum og Runavíkar kommunu til kunningar við boðum um, at Búnaðarstovan vendi aftur eftir fundin.*

Skjal: Teldupostur til Vinnumálaráðið, tann 22. november 2022, við tøkk fyri fund og kunning:
*Tann 22. november 2022 sendi Búnaðarstovan Vinnumálaráðnum teldupost, har takkað varð fyri fundin sama morgun, og har kunning um møguligan endurgjaldsleist varð sent við. Búnaðarstovan kunnaði eisini um, at hoyringsskriv í sambandi við ítøkiliga málið við G í Runavík fór at verða sent seinni sama dag.*

*Í skjølunum sæst ikki notat frá fundinum.*

Skjal: Teldupostur til Vinnumálaráðið, tann 22. november 2022, við kunning:
*Seinni sama dag sendi Búnaðarstovan Vinnumálaráðnum enn ein teldupost, har tað sambært avtalu verður send ein frágreiðing til kunningar, sum Búnaðarstovan, tann 21. juni 2022, hevði sent Fiskimálaráðnum.*

**Mál 23/23686, Løgmálaráðið - Klaga frá A vegna B og D um m.a. málsviðgerðina hjá Búnaðarstovuni í sambandi við mál um vegagerð, G í Runavík**

Skjal: Teldupostur til Vinnumálaráðið, tann 11. januar 2024, við spurningum
*Tann 11. januar 2024 sendi Búnaðarstovan teldupost til Vinnumálaráðið viðvíkjandi kæruavgerðini hjá Løgmálaráðnum og vísti á, at Búnaðarstovan ikki var samd við niðurstøðuni. Búnaðarstovan spurdi, hvussu avgerðin skuldi skiljast, um Búnaðarstovan nú skuldi geva annað endurgjald enn tað, ið ásett var í kunngerðini, um Búnaðarstovan skuldi avgreiða mál um sølu av lendi §9 á sama hátt sum § 7a, og um hvussu Búnaðarstovan framyvir*

*skuldi avgreiða sølumál. Búnaðarstovan vísti á, at tað tykti teimum sum ein lógarbroyting og dagføring í kunngerð kravdist og bað lata seg frætta.*

*Ikki sæst nakað svar ella notat frá møguligum munnligum svari til hendan teldupostin í skjølunum hjá Búnaðarstovuni.*

**Mál 24/08864 – A vegna B og D. Partinnlit og innlit í alt samskifti sum BST hevur havt við Uttanríkis- og vinnumálaráðið í tíðarskeiðinum 1.05.23 til 31.12.23 og alt 2024 viðv. Klagumál um vegagerð, G í Runavík**

*Umframt skjølini í omanfyri nevndu málum, vóru í innlitsmálinum eisini teldupostar frá Búnaðarstovuni til Vinnumálaráðið, sum ikki vóru skjalførdir í nøkrum máli hjá Búnaðarstovuni fyrrenn í sjálvum innlitsmálinum. Teldupostarnir vóru í stóran mun endurtøkur av somu spurningum sum vórðu settir í skjølunum omanfyri. Har sást tó ein teldupostur, dagfestur 12. mai 2023, við heldur øðrvísi innihaldi við tað, at hann endaði við hesum orðum:*

> "Tað einfaldasta fyri Búnaðarstovuna er at taka málið upp til nýggja viðgerð, og so gera somu niðurstøðu enn einaferð, og so kann málið eisini kærast til UVMR, sum nú ikki hevur nakran gegnistrupulleika at viðgera málið og hevur tulkingarrættin til Ll um landsjørð og tískil kann koma til aðra niðurstøðu í málinum í mun til avgerðina hjá FISK, dagf. 28. juni 2022.
> Lat meg frætta nærri, nær tað liggur fyri at hava fund í komandi viku."

*Ikki sæst nakað svar ella notat frá møguligum munnligum svari til hendan teldupostin í skjølunum hjá Búnaðarstovuni.*

## 6. Niðurstøða

Hendan klagan snýr seg um málsviðgerðina hjá Búnaðarstovuni og Vinnumálaráðnum av eini kæru um sølu av innangarðsjørð burturav einum festi. Talan er um tveir myndugleikar, men av tí at málslýsingin í stóran mun er hin sama, verða báðir myndugleikar viðgjørdir í sama áliti, tó við hvør síni niðurstøðu á komandi síðum.

## 6.A Viðvíkjandi Búnaðarstovuni

<u>Spurningur um lýti við fyrisitingarligari avgerð hjá Búnaðarstovuni, tann 30. november 2022</u>
Klagað var um, at Búnaðarstovan í telduposti, tann 30. november 2022, sendi eina fyrisitingarliga ófullfíggjaða avgerð, har klagararnir millum annað ikki vórðu partshoyrdir. Í teldupostinum kunnaði Búnaðarstovan um, at hon hevði tikið málið upp til nýggja viðgerð í samsvar við kæruavgerðina hjá Fiskimálaráðnum. Búnaðarstovan hevði tikið avgerð um at loyva Runavíkar kommunu at fremja avgrevstur og liðugtgerð av vegi á festijørð hjá

klagarunum. Búnaðarstovan kunnaði eisini um, at hon hevði samskifti við Runavíkar kommunu og Vinnumálaráðið í sambandi við, hvussu endurgjald fyri rakstrarmiss skuldi avgreiðast.

Klagararnir skiltu ikki teldupostin sum eina avgerð, fyrrenn kæruumboð teirra seinni setti seg at gjøgnumganga skjølini. Kæruumboðið sendi tá nýggja kæru til Búnaðarstovuna, tann 9. mai 2023, vísandi til, at telduposturin, tann 30. november 2022, var ein fyrisitingarlig avgerð sum ikki livdi upp til fyrisitingarlig krøv, og at alt málið átti at verða viðgjørt av nýggjum.

Tann 31. mai 2023 sendi Búnaðarstovan avgerð, har greitt varð frá støðuni í málinum. Búnaðarstovan hevði ta greiðu fatan, at kæruavgerðin hjá Fiskimálaráðnum ikki setti spurning við heimildina hjá Búnaðarstovuni at selja landsjørð til Runavíkar kommunu. Búnaðarstovan metti, at heimvísingin frá Fiskimálaráðnum av málinum einans fevndi um, at Búnaðarstovan ikki hevði tikið støðu til ognartøku í mun til § 73 í grundlógini. Búnaðarstovan gjørdi greitt, at hon ikki tók støðu til, hvørt lóg um landsjørð var í stríð við grundlógina, og vísti hesum spurningi antin til aðalráðið ella dómsvaldið til støðutakan. At enda í teldupostinum var kæruvegleiðing til Uttanríkis- og vinnumálaráðið.

Búnaðarstovan hevur í frágreiðing til umboðsmannin víst á, at telduposturin, tann 30. november 2022, ikki var ein avgerð um endurgjaldsspurningin. Av somu orsøk metti Búnaðarstovan tað ikki neyðugt at partshoyra ella geva kæruvegleiðing.

Eg haldi, at telduposturin, sum Búnaðarstovan sendi klagara tann 30. november 2022, má metast sum ein avgerð í málinum. Eg leggi í hesum sambandi dent á, at tað í teldupostinum varð kunnað um, at kommunan hevði fingið loyvi at fremja avgrevstur og liðugtgerð, uttan at klagararnir fingu avgreitt endurgjaldið fyri mistan bø, sum teir høvdu kært um. Her gevi eg mær eisini far um, at Fiskimálaráðið í síni kæruavgerð hevði sent málið aftur til Búnaðarstovuna til nýggja viðgerð, og at Búnaðarstovan í teldupostinum, tann 30. november 2022, sjálv skrivaði, at Búnaðarstovan hevði tikið málið upp til nýggja viðgerð.
Telduposturin innihelt tó ikki tey viðurskifti, sum áttu at verið umrødd í eini fyrisitingarligari avgerð. Eitt nú framgekk ikki nóg greitt, at talan var um eina avgerð, eingin tilvísing var til lógargrundarlagið, eins og eingin kæruvegleiðing varð givin. Eg eri tó ikki samd við klagarunum í, at tað vantaði partshoyring. Talan var, sambært skjølunum, ikki um, at Búnaðarstovan hevði fingið upplýsingar viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, sum klagararnir ikki vóru kunnugir við.

Tað var samanumtikið eftir míni meting ikki nøktandi málsviðgerð og ei heldur í samsvar við góðan fyrisitingarsið, tá ið Búnaðarstovan, tann 30. november 2022, sendi klagara ein teldupost, sum mátti metast sum ein fyrisitingarlig avgerð, uttan at lúka vanligu krøvini til eina slíka.

Eg gevi mær tó far um, at ein meira nágreinilig avgerð varð send klagara tann 31. mai 2023, nakrar vikur eftir, at kæruumboðið hevði sent nýggja kæru. Í avgerðini, tann 31. mai 2023, vóru

spurningarnir í heimvísingini frá Fiskimálaráðnum umrøddir, lógarheimildir nevndar og kæruvegleiðing til Uttanríkis- og vinnumálaráðið givin. Búnaðarstovan avgjørdi ikki spurningin um endurgjald, sambært grundlógarinnar § 73, men upplýsti, at Búnaðarstovan ikki metti seg vera rætta myndugleika at taka støðu til hetta orsaka av vantandi heimildargrundarlagi hjá stovninum.

Tey lýti, sum vóru við avgerðini tann 30. november 2022, vóru sostatt eftir míni meting fingin í rættlag við avgerðini tann 31. mai 2023, og eg havi ikki viðmerkingar til hesa seinnu avgerðina, tann 31. mai 2023.

Spurningur um samskipaða viðgerð millum Búnaðarstovuna og Vinnumálaráðið

Klagað var um, at Búnaðarstovan í samskifti og á fundum hevði avtalað við Vinnumálaráðið, hvussu málið skuldi avgreiðast, hóast Løgmansskrivstovan áður hevði tikið avgerð um, at Vinnumálaráðið var ógegnigt í málinum.

Umboðsmaðurin hevur fingið avrit av skjølunum hjá Búnaðarstovuni. Tað sæst, at ávíst samskifti hevur verið millum Búnaðarstovuna og Vinnumálaráðið í sambandi við avgreiðsluna hjá Búnaðarstovuni av málinum.

Í kæravgerðunum hjá Fiskimálaráðnum og Løgmálaráðnum vóru grundleggjandi løgfrøðilig viðurskifti, sum Búnaðarstovan ikki metti seg hava heimild ella mannagongdir til at avgreiða. Búnaðarstovan søkti sær tí ráðgeving hjá Vinnumálaráðnum, vísandi til, at talan var um stórt øki, sum hevði verið umsitið á ávísan hátt og eftir delegatión frá ráðnum. Um nýggjur leistur skuldi gerast, metti Búnaðarstovan seg tørva ráðgeving frá sínum stjórnarráði.

Eyðsæð er, at ein undirliggjandi stovnur hevur rætt til at søkja sær leiðbeining hjá stjórnarráði sínum á einum so stórum og avgerðandi málsøki, sum viðvíkur so nógvum málum. Hinvegin er umráðandi, at stjórnarráðið ikki í sambandi við sína ráðgeving í roynd og veru kemur at avgera eitt aktuelt kærumál, har ráðið fyrst hevur verið ógegnigt, og sum eisini eftirfylgjandi kann enda hjá ráðnum sum kæra.

Hóast umbønirnar frá Búnaðarstovuni sum heild kunnu skiljast sum yvirskipaðar umbønir um vegleiðing, haldi eg tó, at onkrir av teldupostunum meira eru at meta sum umbønir um leiðbeining til aktuella málið hjá klagara.

Viðgerð mín fer fram á skrivligum grundarlagi. Sambært bæði Búnaðarstovuni og Vinnumálaráðnum, fekk Búnaðarstovan hvørki beinleiðis vegleiðing um aktuella málið ella generella vegleiðing og nýggjar leiðreglur at avgreiða slík sølumál eftir, og við gjøgnumgongd av skjølunum havi eg ikki sæð nakra beinleiðis leiðbeining frá Vinnumálaráðnum.
Samanumtikið haldi eg, at Búnaðarstovan má metast at hava roynt at fáa vegleiðing frá Vinnumálaráðnum um avgreiðsluna av aktuella málinum, men sambært upplýsingunum í málinum, havi eg ikki grundarlag fyri at halda, at Búnaðarstovan fekk ynsktu vegleiðingina. Eg

skal í hesum sambandi viðmerkja, at tað ikki er gjørligt hjá mær at eftirkanna hesi viðurskifti til fulnar við tað, at tað ikki síggjast notatir frá telefonsamrøðunum og fundunum millum Búnaðarstovuna og Vinnumálaráðið.

Notatskylda og journalisering
Sambært góðum fyrisitingarsiði, eigur ein myndugleiki at gera notat um avgreiðslu, sum er av munandi týdningi fyri viðgerðina av einum avgerðarmáli, um hendan upplýsing annars ikki framgongur av skjølunum. Hesi notat eiga eisini at verða skjalførd, so tað út frá skjølunum í málinum er gjørligt at fáa yvirlit yvir málsgongdina og viðgerðina av málinum.
Eg gevi mær í hesum sambandi far um, at tað í skjølunum hjá Búnaðarstovuni ikki síggjast notatir frá teimum fundum og telefonsamrøðum, sum hava verið við Vinnumálaráðið. Hóast talan skuldi verið einans um generella vegleiðing, haldi eg, at tað framgongur av samskiftinum, at ætlanin má metast at hava verið at fáa vegleiðing til nýtslu í aktuella málinum.
Eg haldi, at upplýsingarnar, frá bæði fundum og telefonsamrøðum har biðið varð um vegleiðing, áttu at verið noteraðir og skrásettir inn á málið fyri at skapa greidleika og gjøgnumskygni í málinum. Vantandi notatini hava gjørt tað trupult hjá umboðsmanninum at fáa yvirlit yvir, hvat er farið fram í málinum.
Tað var tí ikki nøktandi málsviðgerð og ikki í samsvar við góðan fyrisitingarsið, at Búnaðarstovan ikki skrivaði og journalførdi notatir frá omanfyri nevnda samskifti við Vinnumálaráðið.

Málsviðgerðin tilvitað gjørd fløkt
Viðgerð mín er á skrivligum grundarlagi. Eg eri samd við klaguumboðnum í, at hetta er eitt fløkt mál, havandi í huga ymisku kæruavgerðirnar, sum eru tiknar, ymisku myndugleikarnir, vantandi notatini, og at skjalfestingin er farin fram í ymiskum journalnumrum.
Hesi viðurskifti skyldast eftir míni meting, at málið hevur verið undir viðgerð í longri tíð, og at fleiri umsóknir og kærur eru latnar inn. Eg havi við støði í skjølunum ikki orsøk til at halda, at Búnaðarstovan við vilja hevur gjørt málið meira fløkt enn neyðugt.

Samanumtikið viðvíkjandi Búnaðarstovuni
Samanumtikið fari eg at geva Búnaðarstovuni eina átalu fyri málsviðgerðina í sambandi við kærurnar um graviloyvi og seinni sølu av innangarðsjørð burturav einum festi. Eg fari at minna Búnaðarstovuna á týdningin at notera upplýsingar frá telefonsamrøðum og fundum, sum kunnu hava týdning fyri viðgerðina av einum máli og gjøgnumskygni í málsviðgerðini.

## 6.B. Viðvíkjandi Vinnumálaráðnum

Spurningurin um samskipaða viðgerð millum Búnaðarstovuna og Vinnumálaráðið
Klagað er um, at Búnaðarstovan og Vinnumálaráðið hava samskipað sína viðgerð aftaná kæruavgerðina hjá Fiskimálaráðnum og áðrenn avgerðirnar hjá Búnaðarstovuni, tann 30.

november 2022 og 31. mai 2023, hóast Løgmansskrivstovan hevði lagt málið til Fiskimálaráðið vegna ógegni hjá Vinnumálaráðnum.
Av skjølunum, sum umboðsmaðurin hevur fingið, sæst, at ávíst samskifti hevur verið millum Búnaðarstovuna og Vinnumálaráðið, har Búnaðarstovan hevur sett Vinnumálaráðnum rættiliga nágreiniligar spurningar til kærumálið, sum henda klaga snýr seg um.
Vinnumálaráðið hevur greitt frá, at ítøkiliga kærumálið ikki hevur verið viðgjørt av teimum annað enn við yvirskipaðari umrøðu.
Viðgerð mín fer fram á skrivligum grundarlagi. Við gjøgnumgongd av skjølunum havi eg ikki sæð nakað skjal við ítøkiligari vegleiðing frá Vinnumálaráðnum til Búnaðarstovuna. Vísandi til hetta og frágreiðingina frá Vinnumálaráðnum havi eg ikki orsøk til at halda, at Vinnumálaráðið saman við Búnaðarstovuni hevur samskipað fyrisitingarligu avgerðina hjá Búnaðarstovuni og komandi kærumálsviðgerð av málinum. Eg skal í hesum sambandi viðmerkja, at tað ikki er gjørligt hjá mær at eftirkanna hesi viðurskifti til fulnar við tað, at tað ikki síggjast notatir frá telefonsamrøðunum og fundunum millum Búnaðarstovuna og Vinnumálaráðið.

Notatskylda og journalisering
Tað er greitt, at ein fundur var millum Búnaðarstovuna og Vinnumálaráðið tann 22. november 2022. Hesin fundur var eftir umbøn frá Búnaðarstovuni sum í sambandi við kæruavgerðina hjá Fiskimálaráðnum hevði ymiskar spurningar. Millum spurningarnar var millum annað, hvussu Búnaðarstovan sakliga skuldi avgreiða kæruavgerðina um ognartøku frá Fiskimálaráðnum.
Seinni tann 22. november 2022 sendi Búnaðarstovan tveir teldupostar afturat til Vinnumálaráðið, har takkað varð fyri fundin sama morgun, har tilfar viðvíkjandi endurgjaldsleistum varð sent, og har tað, sambært avtalu, varð sent avrit av telduposti, dagfestur 21. juni 2022, við frágreiðing frá Búnaðarstovuni til Fiskimálaráðið í sambandi við teirra kærumálsviðgerð.
Vinnumálaráðið hevur greitt umboðsmanninum frá, at einki mál varð stovnað, eins og teldupostarnir, sum nevndir verða, hvørki vórðu skjalførdir ella svaraðir. Annað tilfar, t.d. notat o.tíl., varð heldur ikki framleitt í hesum sambandi. Hetta komst av, at ráðið ikki hevði viðgjørt málið og ikki hevði tikið nakra avgerð í málinum. Búnaðarstovan hevði reist spurningin um endurgjald fyri rakstrarmiss og ognartøku nakrar ferðir, men Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevði ikki viðgjørt málið meira enn við yvirskipaðari umrøðu.

Hóast tað ikki er nøkur beinleiðis lógaráseting, ið áleggur almennum myndugleikum at skjalføra sínar upplýsingar og skjøl, so hava almennir myndugleikar skyldu at skjalføra. Skyldan at skjalføra er staðfest í góðum fyrisitingarsiði og fylgir óbeinleiðis av reglunum um innlit og reglunum um almenn savnindi. Notatskyldan í innlitslógini, sum áleggur almennum myndugleikum at skjalfesta munnligar upplýsingar av týdningi fyri eitt avgerðarmál, vísir eisini óbeinleiðis á týdningin av, at ein myndugleiki á skrivligum grundarlagi kann skjalfesta allar týðandi upplýsingar í einum máli.
Havandi í huga, at Vinnumálaráðið sigur seg ikki hava viðgjørt sjálvt málið annað enn við yvirskipaðari umrøðu, var ikki talan um eitt avgerðarmál hjá ráðnum. Ráðið hevði tí ikki,

sambært innlitslógini § 6, skyldu at skriva upp upplýsingarnar, sum vóru frammi á fundunum og telefonsamrøðum við Búnaðarstovuna.
Góður fyrisitingarsiður áleggur tó einum myndugleika at skriva upp málsviðgerðarstig, sum hava týdning fyri mál, sjálvt um talan ikki er um eitt avgerðarmál eftir fyrisitingarlógini.
Avgerðirnar, sum Búnaðarstovan søkti leiðbeining til, vóru eftir míni meting fyrisitingarligar avgerðir av slíkum týdningi og vavi, sum ikki einans kundu væntast at hava ávirkan á ítøkiliga kærumálið, men eisini kundi fáa týdning fyri eitt stórt tal av farnum og komandi málum. Undir slíkum umstøðum haldi eg, at ráðið, sambært góðum fyrisitingarsiði, átti at skriva upp og skjalført, hvørja ráðgeving og leiðbeining tað gav ella ikki gav Búnaðarstovuni. Vavið av hesi ráðgeving hevur eitt nú týdning fyri metingina av gegni, og eisini fyri at kæru- og eftirlitsmyndugleikar kunnu fáa yvirlit yvir, hvat er farið fram í málinum.

Eg haldi tí, at hóast talan ikki var um avgerðarmál hjá Vinnumálaráðnum, áttu teldupostarnir frá Búnaðarstovuni eins og svar ella notat frá fundum, at verið skjalførd, so leikluturin hjá Vinnumálaráðnum greitt kundi síggjast í skjølunum. Av tí at hetta ikki varð gjørt, hevur tað elvt til iva og ørkymlan hjá klagarunum, eins og tað hevur avmarkað møguleikan hjá mær, sum umboðsmanni, at fáa yvirlit yvir málið.
Slík umsiting er eftir míni meting ikki nøktandi og ikki í samsvar við góðan fyrisitingarsið, eins og tað heldur ikki kann metast at vera fremjandi fyri álitið á fyrisitingina.
Eg fari tí at mæla Vinnumálaráðnum til framyvir at skjalfesta samskifti í slíkum málum, fyri at málsskjølini kunnu geva greiða mynd av leiklutinum og svarunum hjá ráðnum.

<u>Ábyrgd hjá Vinnumálaráðnum at skipa økið, so mál kunnu avgreiðast</u>
Í hesum máli tók Fiskimálaráðið í juni 2022 avgerð í kæru um loyvi at fremja graviroyndir í innangarðsjørð hoyrandi til festið í sambandi við vegagerð. Kærumálið varð undir viðgerðini víðkað til heldur at snúgva seg um sølu burtur av festinum. Fiskimálaráðið vísti á, at Búnaðarstovan, sum eigari, sum útgangsstøði kundi selja tað, men at Búnaðarstovan átti at taka støðu til spurningin um ognartøku, sambært grundlógarinnar § 73 í mun til festirættindini. Málið varð tí víst til Búnaðarstovuna til nýggja viðgerð.
Avgerðin hjá Fiskimálaráðnum var, sambært Búnaðarstovuni, ikki gjørlig at fremja, við tað at Búnaðarstovan ikki metti seg hava heimild at avgreiða sølu av landsjørð øðrvísi enn ásett í Ll. um landsjørð og kunngerð tess. Hesa støðu sæst Búnaðarstovan at hava kunnað Vinnumálaráðið um, eins og biðið hevur verið um vegleiðing.
Seinni tók Løgmálaráðið eisini avgerð í kærumáli, í sambandi við, at Búnaðarstovan tá hevði selt ávísar matriklar burturav festi. Løgmálaráðið metti, at spurningurin um endurgjald skuldi avgreiðast eftir ávísum ásetingum í hagalógini, og vísti málið um endurgjald til festararnar aftur til Búnaðarstovuna til viðgerðar.
Avgerðin hjá Løgmálaráðnum var, sambært Búnaðarstovuni, heldur ikki gjørlig at fremja, tí Búnaðarstovan ikki metti seg kunna avgreiða sølu um landsjørð øðrvísi enn ásett í Ll. um landsjørð og kunngerð tess.
Eisini í hesum sambandi sæst Búnaðarstovan hava roynt at leita sær vegleiðing frá Vinnumálaráðnum.

Vinnumálaráðið hevur greitt umboðsmanninum frá, at hóast Búnaðarstovan hevur biðið um skrivliga vegleiðing um, hvussu endurgjaldskrøv í sambandi við rakstrarmiss skulu avgreiðast í síni heild, er slík vegleiðing ikki latin Búnaðarstovuni, tí spurningurin ikki er endaliga viðgjørdur í ráðnum. Spurningurin um endurgjald fyri rakstrarmiss og ognartøku er reistur nakrar ferðir yvir fyri ráðnum av Búnaðarstovuni, men Vinnumálaráðið hevur ikki viðgjørt málið meira enn við yvirskipaðari umrøðu og uttan at koma til nakra niðurstøðu.

Eg spurdi í oktober 2024 Vinnumálaráðið, hvør støðan var í hesum máli um endurgjald, og hvussu ráðið fyriheldur seg til niðurstøðuna frá Løgmálaráðnum, sum Búnaðarstovan sigur seg ikki kunna fremja. Eg spurdi eisini, hvørt ráðið hevði viðgjørt, hvussu Búnaðarstovan framyvir skal viðgera sølu av landsjørð.

Vinnumálaráðið upplýsti í hesum sambandi fyri mær, at tað var farið undir at gera broytingar í løgtingslóg um landsjørð, og at reglurnar um sølu av landsjørð eisini fóru at verða viðgjørdar og mettar.

Fyrst í januar 2025 sendi Vinnumálaráðið lógaruppskot og kunngerðaruppskot í hoyring, sum eisini viðvíkur sølu av landsjørð og endurgjald í tí sambandi.  Eg geri tí ikki meira við tey viðurskifti, sum eru fevnd av lógaruppskotinum.

Eg fari tó at gera vart við, at spurningurin um endurgjald fyri sølu av landsjørð skjótast gjørligt eigur at verða avkláraður løgfrøðiliga. Tað er ikki nøktandi, at avgreiðslan av endurgjaldi skal taka fleiri ár aftaná, at sølan annars er framd. Eisini má væntast, at jú longri økið liggur óavklárað, fer tað at hava við sær óvissu fyri festarar og óneyðugt trýst á Búnaðarstovuna.

<u>Samanumtikið viðvíkjandi Vinnumálaráðnum</u>
Samanumtikið fari eg at geva Vinnumálaráðnum eina átalu fyri málsviðgerðina í sambandi við hetta mál.
Eg fari, vísandi til omanfyristandandi, at mæla Vinnumálaráðnum til framyvir í slíkum førum at skjalfesta og skjalføra samskifti, hóast talan ikki er um avgerðarmál hjá ráðnum, hetta fyri at málsskjølini kunnu geva greiða mynd av leiklutinum og svarunum hjá ráðnum.

<u>Fráboðan um lýti við lógini</u>
Løgtingslógin um landsjørð vísir í § 10 til, at endurgjaldsmál skulu avgerast eftir ásetingunum í § 37 í Hagalógini, um ikki semja fæst. Hetta heldur Vinnumálaráðið vera eitt mistak, sum er komið inn í lógina í 2007. Vinnumálaráðið vísir á, at ásetingin í § 10 í lóg um landsjørð sjálv staðfestir, at festari, sum missir bit, altíð hevur rætt til endurgjald, eins og ásett verður, hvat endurgjaldið skal vera í kunngerð nr. 95. frá 23. oktober 2007 um umsiting av landsjørð við seinni broytingum. Búnaðarstovan metir seg, samsvarandi sjónarmiðinum hjá Vinnumálaráðnum, ikki hava heimild at avgreiða endurgjaldsmál á annan hátt enn eftir kunngerð nr. 95 frá 23. oktober 2007 um umsiting av landsjørð við seinni broytingum. Tískil

sær Búnaðarstovan seg ikki føra at fylgja kæruavgerðunum frá Fiskimálaráðnum og Løgmálaráðnum, sum hava víst á møguligt endurgjald, sambært grundlógarinnar § 73 ella metingarnevnd sambært § 37 í hagalógini.

Vinnumálaráðið hevur boðað umboðsmanninum frá, at ráðið er farið undir at gera broytingar í løgtingslóg um landsjørð, og í hesum sambandi verða reglurnar um sølu av landsjørð eisini viðgjørdar og mettar. Lógaruppskot varð sent í hoyring fyrst í januar 2025 og verður, sambært Vinnumálaráðnum, væntandi lagt fram í hesi tingsetu.

Av tí at eg meti meg hava rakað við lýti í Løgtingslógini um landsjørð og tilhoyrandi kunngerð, fari eg at boða Løgtingi og landsstýrismanninum í Vinnumálum frá hesum, sambært § 12, stk. 1 í lóg um Løgtingsins umboðsmann.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður